**Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.**
**Bygdarráðsfundur tann 24. februar 2016, kl. 19$^{00}$.**

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Herit Magnussen, John Zachariassen
Karl A. Olsen, Hilbert Elisson, Durita á Heygum, Øssur Christiansen
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri boðaði Malan Stórá tann 10. februar 2016 boðað frá, at henni barst frá at møta á fundinum, tí hon er stødd uttanlands.
Tiltakslimurin Øssur Christiansen fekk fundarboð tann 23. februar, og játtaði at møta.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.
Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av Øssuri Christiansen sum tiltakslimur.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

John Zachariassen fór av fundinum, og luttók ikki í viðgerðini av máli 160.

**Mál 160**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um framhald av útstykkingini í Vestri.
J.nr. 01.04.00-G01-2-16

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi 15. februar 2016 mál um framhald av útstykkingini í Vestri.
Í telduposti frá 2. februar 2016 bjóðar Munin seg fram at standa fyri at fyrireika útstykkingina.

Nevndin mælir til at heita á Munin um at standa fyri at fyrireika framhaldið av útstykkingini í Vestri.
Í hesum sambandi skal eisini kannast, um møguligt er at gera eina brúgv heldur enn tvær tvørtur um Hórðará til báðar vegirnar í framhaldinum av útstykkingini.

**Viðv. 160**
Á fundinum setti Hilbert Elisson fram broytingaruppskot, har ið hann mælir bygdarráðnum til at samtykkja at heita á Munin gera eina byggiskrá fyri framhaldið av útstykkingini í Vestri.

Atkvøtt var fyrst um broytingaruppskotið hjá Hilbert Elisson. Broytingaruppskotið var einmælt samtykt, og atkvøtt var tí ikki um upprunaliga tilmælið.

John Zachariassen komin aftur á fundin.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.45

Sign.:

Pauli T. Petersen Karl A. Olsen Hilbert Elisson

Herit Magnussen Durita á Heygum Øssur Christiansen John Zachariassen